*Framhald av síðu 13*

gjørdist hann so ringur, at hann slapp ongan veg. Hann varð fyrst innlagdur á hospitalinum, síðan fór hann á TB, tuberkladeildina hjá hospitalinum. So varð hann innlagdur á sanatoriinum í Hoydølum. Her lá hann í tríggjar mánaðir og slapp so heim. Hetta var væl sloppið. Nógv lógu longri enn tað, ofta í áravís. Eisini doyðu nógv av sjúkuni, eisini i Sørvági.

Í 1927 var Theodor við at fáa eina váta grøv, tá ið hann var við Guiding Star. Tað var illveður, og teir koyrdu lýsi fyri borð fyri at slætta sjógvin. Tá fekk skipið eina fylling, og Theodor var við at fara fyri borð, men pápin fekk tikið hann, áðrenn tað var ov seint.

Theodor hevur eisini siglt við "Only Sister" hjá Absalon Jacobsen á Skála. Skipari var Reinhold Thomsen úr Norðragøtu, og her var Theodor saman við fleiri gøtumonnum, sum hann spurdi eftir hendan dagin. Men tað er eingin av teimum á lívi í dag. Absalon var ættaður úr Syðrugøtu, og hann hevði bert gøtumenn sum skiparar.

Theodor var á motorpassara-skúla í 1929/30. Hann gjørdist motorpassari á Queen, Múlanum og Capellu. Hesi skipini høvdu sama slag av motori, 40 HK Super Skandia.

Hetta sama árið hevði Theodor verið við Capellu inni á Skála, har hon fekk motor ísettan. Theodor var fittur í hondunum og hjálpti til at innstilla motorin. Tá fekk hann tilboð frá Absalon Jacobsen um at sleppa í smiðjulæru á Skála Skipasmiðju, sum Absalon hevði verið við til at seta á stovn. Theodor skuldi byrja, tá ið hann kom aftur um heystið.

Tá hendi tað, at pápi hansara doyr umborð, hann lá deyður í koyggjuni. Tá vóru fleiri av systkjunum framvegis smá. Eingin hjálp var at heinta, so nú mátti Theodor taka ábyrgdina av húsinum. Tí bar ikki til at taka við læruplássinum.

## Ísaði við mold og grasi

Seinasta slupp, sum Theodor var við, var Capella, sum hevði heimstað í Havn.

Í 1936 gavst Theodor við skipslívinum. Tá fekk hann sær bátin Gáshólmur, og fór at royna eftir kalva. Gáshólmur var júst yvir 20 tons og kom tí undir tryggingarskyldu. Tað var so nógvur kalvi har á leiðini, at Theodor helt, at hetta skuldi roynast. Men hetta var kortini rættuliga trupult. Eitt



*Onkran tosk hevur Theodor drigið av grunni*




*Gáshólmur, báturin hjá Thedor. Her sigla teir við jarni til havnabygging*

var, at greiðirnar vóru ringar. Tí var neyðugt at vera vera varin, tá ið sett varð. Tað var eisini trupult at fáa gott agn.

Kalvin skuldu sendast til Danmarkar feskur. Tí mátti hann sigla kalvan til Havnar, har Gynnu Jóannes skipaði fyri at avskipingini.

Tað ringasta var, at tað var so trupult at fáa ís. Eina ferð var einasta loysn ein kavafonn í Tjóðadali. Teir fara eftir kava og ísa kalvan við honum. Seinni komu boð um, at kalvin var berur, tá ið hann kom fram. Tað einasta, sum var eftir av kavanum, var mold og gras. So hetta skuldu ikki roynast aftur!

Ein stuttlig søga er um fyrstu ferð Thedor sá ein bil. Bilur var sjálvsagt nakað øll høvdu hoyrt um, men eingin visti rættuliga, hvussu ein bilur sá út í verki. Eina ferð, teir koma heim frá skipi, síggja teir eitt merkiligt "vesin", sum fer eftir vegnum. Tað fyrsta, sum kom til hugs, var, um hetta kundi vera ein hestavognur, men teir sóu skjótt, at tað var tað so ikki. Tá var hetta fyrsti bilur, sum kom til Sørvágs!

Theodor selur Gáshólm um 1940, og fær sein ein lítlan bát aftur, sum hann rør út við, men hann arbeiddi eisini hjá bretska hervaldinum. Hann letur væl at bretunum í Vágum.

Thedor fekst eisini aftaná kríggið við at stoypa hús fyri fólk. Hann fekk sær blandimaskinu og formar til hetta endamál.

## Giftist og fær handil

Í 1940 giftist Thedor við teirri 5 ár yngri Nenceu, sum eisini var úr Sørvági. Tey fngu 10 børn, fimm av hvørjum slag. Tað hugaliga er, at tey búgva øll í Vágum. Væl er eisini komið undan. Abbabørnini eru 29, og langabbabørnini 48. Tað er eingin vandi fyri, at ættin doyr út!

Í 1955 fer Thedor at handla. Hetta byrjaði við, at Hjalmar Hvítklett, seinni kendur sum ein av reiðarunum á Vesturvón, fór at handla í kjallaranum hjá Theodor. Fimm ár seinni flytir Hjalmar í ein størri handil. Tá fer Theodor at handla sjálvur. Hann fór at tosa við Poul Hansen og fekk vøru fyri kr. 2.300. Væl gekk, og í 1968 bygdi Theodor sær ein nýggjan handil á Gomlu Rætt. Ein slík er eisini í Sørvági.

Theodor fór eisini at selja mjólk. Fyrst var tað í fløskum. Men hetta gav so nógv arbeiði at reinsa fløskurmar, at skjótt varð farið at selja mjólkina í spannum. Mjólkin kom fyrst og fremst úr Bø, hat tað eru fleiri bøndur. Mjólkin var so koyrd til Sørvágs. Men tað var ikki altíð, at tað var koyrandi til Bíggjar fyri kava. Tá var ikki kavarudding sum í dag, so teir máttu sjálvir rudda kavan av vegnum. Var ov nógvur kavi varð farið við báti eftir mjólkini. Hetta kundi vera strævið.

Theodor seldi eisini gass fyri Gass Martin í Havn. Theodor gavst at handla umleið 1975.

## Virkin missiónsmaður

Theodor hevur verið virkin missiónsmaður alla sín tíð, og tað vóru foreldrini eisini. Men tað kann vera áhugavert at nevna, at abbi hans-ara Thomas Djonesen (1857-1926), vanliga kallaður Djóna Tummas var tann fyrsti í Sørvági sum var umvendur gjøgnum gamla Sloan um aldamótið. Hann fór at halda møtir í skúlanum, men tá ið fólk skiltu, at hetta varð ein nýggj læra, varð skúlin stongdur.

Í blaðnum Naade og Sandhed, útgivið av Arthur Brend og Daniel J. Danielsen, hevur Tummas í 1916 eina frásøgn um, tá ið hann í 1910 saman við einum soni og ein gentu úr Sørvági fór við ferðamannaskipi til Íslands, har ætlanin var at rógva út. Vegna veður vórðu teir settir av í Raufarhøfn í staðin fyri sum ætlað á Heiði norðantil á Langanesi.

Tey trý máttu so við øllum viðførinum í einum tríbekki sigla við seglum til Heiðar. Hendan ferðin tók 9 tímar, og teinurin var 30 fjórðingar. Tey vóru ikki meira enn framkomin, tá brast á við illveðri. Tá kundi verðið verri vorðið.

Henda frásøgnin verður nýtt sum mynd fyri ein andaligan boðskap. Tummas hevur uttan iva kent Daniel J. Danielsen, hvørs dramatiska lív í Congo er lýst í Miðvikuni. Hann var sera virkin í brøðrasamkomuni í Sørvági fyrstu tíðina. Hetta man vera grundin fyri, at henda søgan er varðveitt.

## Synd at koyra bil sunnudag!

Annars greiðir Theodor áhugavert frá, hvussu fast fólk hildu um tað at halda sunnudagin heilagan. Tá ið missiónsvikur vóru, og tey vóru koyrd í lastbili var prátað um, hvørt tað ikki mundi vera synd at koyra bil sunnudag. Førarin á bilinum mátti jú arbeiða heilagt!

Theodor hevur luttikið í missiónsarbeiði bæði við at hava eitt orð og tímiliga. Hann var við til at byggja missiónshúsið í Sørvági.

Hann hevur eisini havt gott samband við Kirkjuliga Missiónsfelagið og kennir væl Elsu Jacobsen, hvørs spennandi lív í Etiopia hevur verið lýst í Miðvikuni. Í stovuni hevur hann eina mynd av, tá ið Elsa varð vígd til trúboðara í 1960. Eisini hjálpti hann í síni tíð til at byggja Missiónshúsið við Landavegin.

## Virkin í nærum 100 ár

Theodor er fyrsti innføddi sørvingur, sum er blivin 100 ár. Tó var ein 100 ára føðingardagur í Sørvági fyri góðum 50 árum síðani, tá ið Eiriks Poulina, ættað úr Mykinesi, gjørdist 100 ár. Hon var sera sterk. Eina ferð bar hon ein 200 punds sekk heima av Bakkanum. Henni var lovað, at hon skuldi eiga sekkin, um hon kláraði tað.

Alt í alt heldur Theodor, at alt hevur lagað seg væl hjá honum. Heilsan hevur verið hampiliga góð. Nú er so báturin seldur, men hann var fleiri ferðir á floti so seint sum í fjør. Hann heldur, at tað er gott ikki at hava nógvar kreftir, tí so ovtekur ein seg ikki! Hvussu tað er við hesum vita vit tó ikki.

Hann var uppi eini tekjuni hjá sær, tá ið hann var 96 ár. Hann tók koyrikort sum gott 50 ára gamal og koyrdi, til hann var 87 ár.

Framvegis fylgir hann sera væl í tí, sum hendir í samfelagnum. Áhugin fyri fiskiskap er framvegis stórur. Er hann ikki sjálvur á kaiuni at fregnast um fiskarí, so ringir hann at vit, hvussu tað gongst.

Hann er framvegis einsamallur í húsi. Men við øllum børnunum í oynni, er hann ikki einsamallur. Døturnar geva honum døgurða, men annars klárar hann seg sjálvan.

Føðingardagurin í missiónshúsinum Libanon eydnaðist væl, hóast líkindini ikki vóru tey bestu. Nógv fólk heiðraðu føðingardagsbarninum og hava vit fingið myndir, sum eru tiknar av abbasoninum Bárði.

Tað var stuttligt og lívsjáttandi at hitta Theodor. Vit takka fyri hetta áhugaverda prátið, sum er eitt áhugavert íkast til søgu føroyinga í 20 øld.